## VIÐMERKINGAR

# Arvurin frá Jan Christiansen

**Heðin Mortensen**
*Borgarstjóri*



Fyrrverandi borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Jan Christiansen, vísir eina nýggja síðu í lesarabrævi í bløðunum í gjár. Hesin alfaðirligi kærleiki til miðbýin, er ikki sæddur fyrr og als ikki tá hann sat sum borgarstjóri. Men tað er sjálvandi altíð lættari at lova, tá ein ikki noyðist at halda lyftini.

Arbeiðið við at umvæla kloakkirnar í miðbýnum er neyðugt arbeiði. Ætlanin var at fara undir arbeiðið í fjør, men Jan Christiansen valdi at útseta arbeiðið til í januar. Um orsøkin var, at valár var í fjør, kunnu vit bara gita um. Men hetta neyðuga arbeiðið arvaði sitandi býráðssamgonga.

Fleiri orsøkir eru til, at arbeiðið ikki varð gjørt í januar, men eyðsæð er, at trupult er at gera slíkt arbeiði í áarføri og vetrarveðri. Eisini er trupult at fáa asfalt í januar, tá asfaltframleiðarnir bert framleiða frá mai til oktober.

Tá tíðarætlanin fyri hetta arbeiðið varð gjørd, vóru fleiri atlit, sum skuldu takast. Neyðugt var at gera arbeiðið, meðan asfalt var, og ikki meðan alt ov nógv ferðafólk var í býnum. Hetta skuldi tí antin gerast nú ella í august/september. Í august er Listastevna og ymiskar konferansir, og tí er nógv ferðsla í býnum. Tí er trupult at stongja vegir tá. Eisini eru nógv børn, sum byrja í skúla í august, tí er tað sera óheppið at umleggja miðbýarferðsluna, soleiðis at hon í størri mun koyrir fram við skúlunum.

Tað er sjálvandi óheppið, at arbeiðið er til ampa fyri søluna hjá handlunum í miðbýnum, tí verða vegir heldur ikki stongdir meira enn alneyðugt er. Men vit vita samstundis, at arbeiðið skal gerast, og tí verður tað gjørt.

# Diskvalifiserað vegna kyn...?!

**Annita á Fríðriksmørk**
*tingkvinna Tjóðveldisfloksins.*



35 nevndarsessir verða í valdir í hesum døgum.

Talan er um nevndarsessirnar hjá teimum almennu partafeløgunum, sum í dag eru mannaðir við 28 monnum og 7 kvinnum.

Tað almenna eigur 100% av partapeninginum, og ger tí suverent av, hvør í mannar hesar nevndir, burtursæð frá nøkrum fáum starvsfólkaumboðum, sum verða vald av starvsfólkunum á arbeiðsplássunum.

Landsstýrið velur nevndirnar á hvørjum ári, og tað er nú um várið, at nevndirnar verða valdar av nýggjum.

Í hesi vikuni hevur fokus verið sett á ójavna kynsbýtið í nevndunum, í sambandi við fyrispurning frá undirritaða til landsstýrismannin í javnstøðumálum.

Hetta átti at verið nóg góð motivation hjá landsstýrismanninum í vinnumálum, sum velur nevndirnar, og hjá landsstýrismanninum í javnstøðumálum, sum varðar av javnstøðuni, at fingið rættað uppá skeivleikan.

Landsstýrismaðurin í Vinnumálum segði við útvarpið nú um dagarnar, at orsøkin til ójavna kynsbýtið var, at kvinnurnar manglaðu tær neyðugu útbúgvingarnar, og at tað tí bara var ein spurningur um tíð, nær hetta ójavna býtið varð søga. Hann væntaði, at kvinnurnar við tíðini fóru at taka hesar útbúgvingarnar, sum vórðu neyðugar fyri at sita í hesum nevndum.

Um vit hyggja at hvørjar útbúgvingar, ið verandi nevndarlimir hava, so er í høvuðsheitum talan um økonomar, juristar og verkfrøðingar, sum í dag umboða nevndirnar. Tvs at talan er um heilt vanligar hægri útbúgvingar, sum eru rættiliga vanligar fyri bæði kvinnur og menn, eisini í Føroyum. So hatta við manglandi útbúgvingum hjá kvinnum mundi bara vera ein hjálparleys undanførsla, sum ikki kann brúkast til nakað!

Í **svarinum** frá landsstýrismanninum til undirritaðu, verður upplýst, hvussu býtið er í teimum ymsu almennu partafeløgunum, og sær býtið soleiðis út:

| | Nevndarlimir tils. | Kvinnur | Menn |
|---|---|---|---|
| P/F Fiskaaling | 6 | 2 | 4 |
| P/F Føroya Tele | 6 | 1 | 5 |
| P/F Atlantic Airways | 5 | 1 | 4 |
| P/F Føroya Lívstrygging | 5 | 2 | 3 |
| P/F Norðoya tunnilin | 5 | 0 | 5 |
| P/F Vága tunnilin | 5 | 0 | 5 |
| P/F Postverk Føroya | 3 | 1 | 2 |
| **Tilsamans** | **35** | **7** | **28** |

Tað sum ikki ger støðuna betri hjá landsstýrinum er, at av teimum 7 kvinnunum, sum manna nevndirnar í dag, eru tær flestu starvsfólkaumboð. Tvs at talið av kvinnum, sum tað almenna velur er nógv minni enn 20 %!

Men um tað er so ringt at finna ta røttu kvinnuna, hví so ikki í framtíðini ganga hugskotinum hjá Miðflokkinum á møti, um at lýsa eftir fólki til at manna hesar týdningarmiklu og framúr væl løntu nevndarsessirnar. Tá kundi embætisverkið gjørt tilmæli út frá umsóknunum, og mælt til kvinnur og menn við teimum bestu prógvunum, royndunum og eginleikum annars. Soleiðis komu vit eisini lættari burturúr illgitingum um politiskar starvssetanir. Møguliga verður hetta nakað umstendiligari enn verandi skipan, har landsstýrismaðurin peikar á fólk (menn?). Men tað ger onki, og serliga ikki tá ið talan er um nevndarsessir, sum eru nógv teir best alment løntu nevndarsessir í landinum.

Í øllum førum kann mann ikki liva við, at landsstýrið, sum enntá er mannað við 7 monnum, uttan himpr velur at velja kvinnurnar frá aftur í ár, bara tí tær eru kvinnur! AT verða kvinna eigur ikki at verða ein diskvalifikatión í sær sjálvum. Hetta vóni eg, at landsstýrið tekur í álvara, nú fokus er sett á málið. Landsstýrismaðurin í javnstøðumálum lovaði so í løgtinginum mikudagin, at hann vildi heita á landsstýrismannin í Vinnumálum um at taka atlit at javnstøðulógini, hóast almennu partafeløgini ikki eru fevnd av hesi lóg. Almennu partafeløgini eru hinvegin fevnd av partafelagslóggávuni, sum als ikki tekur hædd fyri javnstøðu.

So vóni eg, at Hans Pauli meinar nakað við hesa áheitan og at Bjarni tekur hana í álvara!

Livst so spyrst!

Vónandi vil umrøðan, sum verið hevur um málið hesa vikuna flyta okkum eitt fet frameftir!

# P/f Fólkaskúlin?

**HUXA-Fólkafloksungdómur**

Er almenni fólkaskúlin í dag í lagi? Fáa vit nógvar góðar og dugnaligar næmingar aftaná 9 og 10 skúlaár? Er samsvar millum almennu játtanirnar og førleikan hjá næmingum aftaná 9 ár í fólkaskúlanum? Nei, spurningarnir viðvíkjandi hesum serliga eldfima evni eru nógvir. Kanska er tað tí, at eingin torir at stilla hesar spurningar alment. Hin almenni, føroyski fólkaskúlin er eitt hjartabarn hjá nógvum vinstrahallum røddum í tí føroyska samfelagnum.

HUXA Fólkafloksungdómur loyvir sær at nýta sín demokratiska rætt at hugleiða um støðuna hjá tí føroyska fólkaskúlanum. Eisini vilja vit koma við einum dømi, ikki álopi, hvussu ein almennur fólkaskúli kundi blivið betri við øktari kapp-

Fólkaskúlin í dag sigst ikki at vera betri enn fyrr. Pedagogiska undirvísingin við nógvum skeiðum fyri lærarar, ið tíverri ofta verður lagt í skúlatíðini, tykist ikki hava verið til stóran bata fyri fleiri av teimum so mongu næmingunum í føroyska fólkaskúlaheiminum.

Næmingarnir roykja ongantíð meiri í dag enn áður. Næmingarnir hava aldrin skulkað meiri enn hesi seinastu fimm, tíggju árin og krøvini til lærarar og næmingar eru í stóran mun blivin linari. Lærarnir sleppa ofta avstað við løttum, við at nýta sama gamla tilfarið. Summar av bókunum røkka heilt aftur til 60'árini. Ein loysn kundi verið studningur, eins og í miðnámsskúlunum, har næmingar fáa høvi at keypa nýtt og dagført undirvísingartilfarð.

Ongantíð fyrr hevur so nógv góðgæti verið við til

ingum og undirvísingartímar hjá lærarum. Hetta er nakað, ið nógv verður tosað um, men ov lítið er gjørt við.

Eiheldur gera foreldur og lærarir nóg nógv fyri, at børn um 14 ár ikki skulu ganga skít og mala í býnum aftaná uml. kl. 03.00 leygar- og sunnumorgnar. Hetta eru ting, sum gera sítt fyri, at skúlagongdin órógvast, tá ið hugsað verður um allar teir vandar, sum eru í størri mun eru í dag enn fyri nøkrum árum síðani.

Hvat við børnunum við serligum tørvi? Fáa tey nøktandi hjálp frá fólkaskúlanum? Ikki eftir okkara tykki, tí tað almenna Føroyar hevur einfalt ikki ráð. Tað, er so í sjalvum sær ein sjálvfylgja, tá ið hugsað verður um allar tær himmalhøgu almennu útreiðslurnar, sum skulu til fyri at halda tí sokallaða norðurlendska/universella vælferð...

andi. Hvør fíggjar? Jú, tað ger Palleba, eisini hann sum eingi børn eigur.

Hvat er trupulleikin við privatiseringum av nøkrum almennum fólkaskúlum? Hetta hevði kunnað virkað fyri, at støðið á teimum almennu skúlunum hevði hækkað. HUXA dugir illa at ímynda sær, hvussu førleikin í fólkaskúlanum hevði blivið verri, enn hann er í dag, um privateraðir fólkaskúlar hevði verið partur av gerandismyndini.

Við einari rakstrarjáttan á fíggjarlógini á góðar 230 mió. kr.,- um árið, er heldur torført at skilja, hví støðan í tí almenna føroyska fólkaskúlanum er so vánalig, sum hon er.

Allir spurningar um fígging og hølisviðurskifti, læraraførleika o.s.fr. hevði verði loystir nógv einfaldari á privatum grundarlagi. Foreldrini hjá børnum høvdu nógv lættari kunnað

og leiðslu, og veruliga sæð mun á førleikanum hjá børnunum. Kappingin millum skúlarnar hevði hækkað undirvísingarstøðið, uttan tað endiliga hevði kostað nakað eyka.

Tann brennandi spurningurin er, hvat við teimum, sum ikki hava ráð? Tað er ein reellur spurningur. Sum øllum kunnugt, gjalda vit øll skatt til m.a. til fólkaskúlan. Um foreldur velja, at koyra børn í ein almennan skúla, so høvdu tey per automatikk goldið fyri børnini gjøgnum beinleiðis skatt av inntøkuni, meðan tey, sum velja at koyra børnini í ein privatiseraðan skúla, fingu møguleika at gjalda skúlagongdina við einum skattafrádrátti áljóðandi prísinum, ið tað prosentvís kostar um mánaðin í skatti at hava børnini í einum almennum skúla. Hettar vil við øðrum orðum siga, at fólkaskúlar høvdu verið

minni almenna uppíblanding og størri skúlavalfrælsi til ta einstøku familjuna.

Fíggingarloysirnar eru mangar! Ja, hetta er ein nýggjur tanki í føroyskum hugaheimi. Hesin tankin gevur landsstýrinum møguleikar at spara pening, umsiting og orku, og samstundis økir hetta um førleikan hjá ungdómi okkara aftur at fáa eina disiplineraðan, sunnan hugburð til skúlan.

Vit í HUXA Fólkafloksungdómi vilja kasta ljós á hetta økið í føroyska samfelagnum, tá ið framtíðarútlitini fyri núverandi vitanarsamfelagi krevja eitt gott grundarlag fyri víðari lestur og útbúgving.